## Børn ið hava fingið tikið polyppur




Barnið kemur vanliga heim aftur sama dag. Barnið kann haldast heima til mánadagin, og skal onkur vaksin vera um barnið alla ta fyrstu vikuna.

**Viðvíkjandi mati:**

1. dag: Bert kaldan, flótandi mat.

Síðani bleytan mat (breyð uttan skorpu, greyt, eplamos, fars og líknandi). Maturin má ikki vera ov heitur ella ov kryddaður.

Góðgæti: Einki uttan ís.

Frukt: Einki uttan banan og fruktsaft.

Tá ein vika er farin: Vanligan mat

**Fyri pínu:**

Tablettir, mikstur ella stikkpillara PAMOL, PINEX e.l.

Barn: 10-20 kg: 125 mg í mesta lagi 4 ferðir dagliga.

Barn: 20-30 kg: 250 mg í mesta lagi 4 ferðir dagliga.

Frárátt verður at svimja og gera fimleik fyrstu 10 dagarnar. Skurðviðgerð av børnum fer vanliga fram fyrrapartin.

Smæðist ikki, um tit hava eitt hvørt at spyrja um!

Oyrna-nasa-hálsdeildin

Landssjúkrahúsið